

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 05 - 2012

# Falklandsoyggjabúgvar vilja læra av hetlendingum

Eins og føroyingar og grønlendingar í norðara parti av Atlantshavinum royna at finna olju og gass, so gera oyggjabúgvar heilt har suðuri í Atlantshavi somu royndir sum vit. Og fyri at fáa rætta íblásturin og lærdómin, hvussu eitt oyggjafólk í Atlantshavi skal bera seg at, tá møguligt oljuríkidømi nærkast, so hevur stýrið og vinnan á Falklandsoyggjunum leitað heilt norður til okkara leiðir at fáa sær neyðuga íblásturin. Seinastu dagarnar hevur ein sendinevnd úr Falklandsoyggunum vitjað Hetland. Suðuratlantsbúgvarnir hava møtt myndugleikaumboðum og vitjað kring Hetland. Hetlendingar hava nú í mong ár livað við eini oljuvinnu og hava tí givið gestunum síni boð uppá, hvussu tað er skilabest at menna eina oljuvinnu. Fleiri fund eru longu gjørd í Falklandsoyggjunum og í løtuni royna oljufeløg at finna íleggjarar til at fara undir veruligar útbyggingar, sum skulu gera oyggjarnar til eitt nýtt oljuland á heimskortinum. Ikki færri enn 40 fólk eru við í ferðalagnum, sum telja 1% av samlaða fólkatalinum í Falklandsoyggjunum. Ferðin til Hetlands er 8300 fjórðingar. Ørindini eru so ikki bara at læra um oljumenningina, men eisini hvussu hetlendingar hava borið seg at við at menna aling og fiskivinnuna. Leiðarin fyri ferðalagið úr Falklandsoyggjunum sigur sambært einum tíðindaskrivi frá hetlendsku myndugleikunum, at tey hava fingið sera nógv burtur úr vitjanini, serstakliga at síggja, hvussu vinnan og myndugleikarnir í Hetlandi hava megnað at samráðast við oljufeløgini fyri at tryggja lokala luttøku í oljuvinnuni. Mynd Umboð fyri vinnudelegatiónina úr Falklandsoyggjunum, sum vitjar Hetland í hesum døgum. Fv. Lewis Clifton, Byron Marine; Dick Sawle, limur av løggevandi tinginum, Roger Spink, forseti fyri vinnumálaráðið, Cheryl Roberts, Beauchene Fishing Company Ltd; og Hamish Wylie, Sea Fish Falklands.